


# Eingil í vesturbýnum

Kristin Steinsdóttir

Þóra Þóroddsdóttir týddi úr íslendskum
Myndir: Halla Sólveig Þorgeirsdóttir
Bókadeild Føroya Lærarafelags 2006
NÁM. Gunvá Magnussen og Lis í Jákupsstovu

Tit fara at arbeiða við myndabókini *Eingil í vesturbýnum*. Bókin er uppruna íslendsk, Kristín Steinsdóttir hevur skrivað og Halla Sólveig Þorgeirsdóttir hevur teknað. Þóra Þóroddsdóttir hevur týtt til føroyskt.

## Áðrenn tú lesur bókina

- Hygg at permuni.
- Hygg at baksíðuni.
- Les baksíðutekstin.
- Hygg at innihaldinum (gula opnan við øllum myndunum og heitunum á pørtunum).

## Tankakort

Tit skulu hvør í sínum lagi gera tankakort, brúkið 5 minuttir til uppgávuna.

- Hvat væntar tú, at bókin er um, hvussu er huglagið og temað?
- Hvør er høvuðspersónur?
- Hvat/hvør er trupulleikin?
- Hví munnu for- og baksatsurin vera tann litin teir eru?
- Hví munnu hús vera á for- og baksatsinum?
- Hví man ein eingil vera á baksatsinum?
- Hvussu heldur tú, at huglagið í bókini er, man bókin vera stuttlig, undirhaldandi, syrgilig, spennandi ella okkurt heilt annað?

## Framløga

Tit skulu í bólki siga hvør øðrum, hvat tit vænta av bókini. Hvør bólkalimur hevur ein av spurningunum omanfyri at leggja fram. Hini skulu/kunnu siga sínar tankar um hvønn spurning, so hvørt tit hava lagt fram.

## Lurtið eftir bókini

Tit kunnu fara á kvf.fo/VIT og har finna *Eingil í vesturbýnum*, Hjálmar Dam lesur bókina í 5 pørtum. Lurtið eftir 1. parti. Tit kunnu fylgja við í bókini, meðan tit lurta.

## Orðið á borðið

Nú hava tit hoyrt 10 tær fyrstu opnurnar av søguni og fara at arbeiða við tí, sum tit hava hoyrt. Tit byrja við at arbeiða í bólki. Hvat heldur tú um hesar fyrstu síðurnar í *Eingil í vesturbýnum*?

- Hvør bólkalimur skrivar eitt orð á ein lepa, leggur lepan á borðið og vendir lepanum, so eingin sær, hvat stendur á honum. Blandið leparnar. Eftir tørni tekur ein bólkalimur ein lepa, lesur, og tann, sum hevur skrivað á hendan lepan, greiðir munnliga frá, hví hann/hon hevur skrivað akkurát hetta orðið. Tit halda á, til øll hava tikið ein lepa.

## Snakka við ein makkara

Í myndabókini fáa tit eitt sindur at vita um Ask. Hann fortelur um, hvar hann býr, upprunan til navnið hjá sær, hann sigur frá um svimjiløtur saman við pápanum, lesiløtur saman við mammuni, ein eingil, ein varúlv og um veðrið.

- Hvat vita tit nú um bókina?
- Hvør er høvuðspersónur?
- Hvar gongur alt fyri seg?
- Hvussu dámar tær bókina higartil?
- Hevur tú gitt nakað rætt, tá ið tú gitti, hvat bókin var um?

## Skriva saman við einum makkara

Tá ið tú og makkarin hava snakkað saman um spurningarnar omanfyri, skriva tit spurningarnar og svar í heftið hjá tykkum.


Húsini hjá okkum


Húseingilin


Kunnu varúlvar umskapast til einglar?


Gudalæra I
Gudalæra II


Regn


Torn


Høgguslokkur


Einaferð


Ein kvøldsøga


Kolandi

# Lurtið eftir bókini

Lurtið eftir øðrum parti av *Eingil í vesturbýnum*.

# Mynd

7 opnur eru í 2. parti, tit skulu arbeiða við øllum opnunum í hesum partinum. Hvør bólkur fær eina opnu at arbeiða við. Hyggið hvør í sínum lagi væl at myndini á opnuni.

- Hvat er á myndini?
- Hvat sært tú fyrst?
- Hvørjir litir verða brúktir á myndini? Hvussu ávirka litirnir myndina, er myndin hugnalig, óhugnalig, glað, syrgin ella annað?
- Hvussu er tekningin, eru tað beinar linjur, tekningar av fólkum, skitsu kent, teknað við teldu ella annað?
- Hygg enn einaferð at myndini, er okkurt, sum tú ikki sást beinanveg? Hvat var tað, tú ikki sást beinanveg?
- Er okkurt, sum er meira torført at fáa eyga á?
- Man teknarin vilja, at tú ikki sært alt beinaveg?

# Tekstur

Les tekstin á opnuni væl. Tit kunnu lesa ein og ein. Tit kunnu seta tykkum nøkur saman at lesa, tit kunnu skiftast um at lesa, ella ein lesur allan tekstin og hini lurta.

- Hvussu er teksturin at lesa?
- Finn orð, sum eru fremmand ella eitt sindur ókend. Vita, um tú skilir tekstin, sjálvt um har er okkurt orð, sum tú ikki kennir.
- Skriva í punktsniði, hvat hetta brotið er um.

# Mynd og tekstur

- Hvussu hóska mynd og tekstur á opnuni saman? Grundgev fyri tínum svari.
- Ger eitt dømi um, hvussu tú hevði teknað til tekstin á opnuni.


Njósnaraúlvur


Tað lítla reyða húsið


Samvitskubit


Ullarkonudrongurin


Sólarenning


Tann ljóshærda gentan á farstøðini


Klikkheysar


Bollar og sniglar

## Lurtið eftir bókini

Lurtið eftir triðja parti av *Eingil í vesturbýnum*.

## Yvirskrift/heiti og mynd

Tit hava hoyrt *Fyrsti kavin, Riflur, Reyðhetta Smokkuleggur, Rúmdarfar við glaring, Tøgn, Rennilás, Ein nýggj song, í Speglinum, Sól og máni og Flúgvandi jóladøgurði.*

- Hygg at yvirskriftunum/heitunum og tekningunum. Passa yvirskrift og tekning saman? Hvat ger, at tær passa saman, ella at tær ikki passa saman?
- Hvørja yvirskrifti hevði tú valt til hvørt av hesum brotunum?


Fyrsti kavin


Riflur


Reyðhetta Smokkuleggur


Rúmdarfar við glaring


Tøgn


Rennilás


Ein nýggj song


í Speglinum


Sól og máni


Flúgvandi jóladøgurði

## Opnur

Eingil í vesturbýnum er skrivað í opnum og flestu opnur kunnu lesast hvør sær, men onkrar opnur hoyra saman á tann hátt, at tá ið tú lesur seinnu opnuna, so verður eitt sindur lagt afturat, tú fært meira at vita um persónarnar ella hendingina.

- Vís á, hvørjar av opnunum, sum tit akkurát hava hoyrt, hoyra saman og grundgev fyri, hví tú heldur, at hesar hoyra saman.

## Floksarbeiði

- Snakkið saman í flokkinum um uppgávurnar.
- Sigið hvørjum øðrum, hvørjar yvirskriftir tit hava valt, og hví tit hava valt hesar yvirskriftir.
- Snakkið um, hvørjar opnur tit halda hoyra saman og finnið út av, um øll halda tað sama. Hví halda tit tað sama, hví ikki?

# **UPPGÁVUR** til næmingin

Eingil í vesturbýnum

4 PARTUR

## Lurtið eftir bókini

Lurtið eftir fjórða parti av *Eingil í vesturbýnum.*

Í hesum partinum upplivir Askur eitt sindur av hvørjum, hann sigur frá um nýggjárið, um eina serliga hending í háhúsinum, túrar niðri við vatnið, hárstíl, happing, systkin, fastalávint, djór, at lurta í skúlanum, at vera bangin fyri ymiskum og ferðing. Askur hugsar og undrast nokk so nógv.

## Snakkið saman tvey og tvey

Snakkið saman tvey og tvey um spurningarnar niðanfyri.
Skrivið stikkorð, tá ið tit svara spurningunum.

- Í hvørjum parti hoyra vit nakað um tað at vera bangin?
- Hvussu sæst, at Askur er bangin, sigur ella ger hann nakað, sum vísir tað?
- Í hvørjum parti er happing?
- Hvussu verður happað? Er tað Askur, sum verður happaður?
- Í hvørjum parti hoyra vit um Ask sum stórabeiggja?
- Hvussu dámar Aski at gerast stóribeiggi?

## Snarskriving

Tit skulu nú hvør í sínum lagi skriva í 5 minuttir, brúkið stikkorðini. Tit kunnu lesa tað tit hava skrivað fyri flokkinum.

- Skriva um Ask, tá ið hann er bangin.
- Skriva um Ask, tá ið hann upplivir happing.
- Skriva um teg sjálva/sjálvan, tá ið tú upplivir at vera bangin.


Tá ið tað gamla árið fer aftur um bak


Loyndarmálið hjá silvurfiskinum


Høvuðleysur


Ongantíð ov skjótt


Tíðindi


Fastalávint


Tveir ímóti einum


Happing


Tóki og abbin


Tann gráa dunnan


At ferðast

## Tekningar

4 PARTUR

Hygg væl at tekningunum í hesum partinum.

- Er onkur tekning, sum vísir, at Askur er bangin? Grundgev svarið.
- Er onkur tekning, sum vísir happing? Grundgev svarið.
- Er onkur tekning, sum vísir, hvar Askur er? Grundgev svarið.
- Er onkur tekning, sum vísir, hvat Askur hugsar um? Grundgev svarið.

Snakkið saman í flokkinum um tað, sum tit eru komin fram til.

- Eru tit samd?
- Eru tit ósamd?
- Hvørjar tekningar eru tit mest samd um?
- Hvørjar tekningar eru tit mest ósamd um?

# **UPPGÁVUR** til næmingin

Eingil í vesturbýnum

5 PARTUR

## Lurtið eftir bókini

Lurtið eftir seinasta partinum av *Eingil í vesturbýnum*.

Nú hava tit hoyrt alla søguna *Eingil í vesturbýnum* og fara at arbeiða við allari bókini.

## Bygnaður

*Eingil í vesturbýnum* er myndabók, og flestu myndabøkur eru bygdar upp á serligan hátt. Ofta er ein høvuðspersónur, søgan hevur byrjan, miðju og enda, ella sum tað eisini verður rópt heim-út-heim. Vit kunnu siga, at søgan byrjar við, at høvuðspersónurin er heima, so fer hann út í verðina, og í endanum á søguni er hann heima aftur og hevur lært okkurt nýtt á ferðini.

Tosið saman tvey og tvey um spurningarnar niðanfyri, so fara tit saman við fýra øðrum at samanbera tykkara hugsanir.

- Hvussu riggar *Eingil í vesturbýnum* inn í heim-út-heim frásøgustílin? Vís á dømi.
- Hvat og hvørjum møtir Askur á ferðini?
- Hvussu long er søgutíðin?
- Hvussu klárar Askur ferðina?
- Hvat slag av ferð er Askur farin á?

## Huglag

Tekstur og myndir skapa eitt ávíst huglag. Rithøvundurin kann við sínum orðum skapa eitt ávíst huglag og teknarin kann skapa eitt ávíst huglag við litum (ljósir/myrkir, heitir/kaldir).

Arbeiðið í bólki. Skrivið eitt orð í part.

- Hvørji orð kunnu vit brúka, so huglagið í einari søgu gerst lætt, fólk eru glað?
- Hvørji orð hóska væl at brúka, um huglagið skal vera syrgiligt, óhugnaligt, fólk eru kedd ella bangin?
- Hvørjir litir rigga væl, um huglagið skal vera lætt, ella fólk skulu vera glað?
- Hvørjir litir rigga væl, um huglagið skal vera syrgiligt, óhugnaligt, fólk eru kedd ella bangin?


Úlvurin í skóginum


Hans og Greta


Beiggi mín I
Beiggi mín II


Kalsvognurin


Framtíðardreymar


Orkesturbremsur


Klárt í veðrinum


Vinir


Gávan


Stóribeiggi

# Snakkið saman í flokkinum

5 PARTUR

- Hvussu er huglagið í *Eingil í vesturbýnum*?
- Hvussu vísir teksturin huglagið?
- Hvussu vísa myndirnar huglagið?
- Vel eina opnu í *Eingil í vesturbýnum*, sum tú heldur vísir eitt serligt huglag. Les tekstin væl og hygg gjølla at myndini.
- Hvat hava rithøvundurin og teknarin gjørt fyri at fáa eitt ávíst huglag á hesari opnuni?

Kanska hevur onkur í flokkinum valt somu opnu sum tú. Snakkið saman um opnuna og tað, sum tit hvør í sinum lagi hava hugsað og skrivað um opnuna og huglagið.

Snakkið saman í flokkinum.

- Hvørjar opnur valdu tit?
- Sigið frá um tykkarar opnur í raðfylgjuni sum tær eru í bókini.
- Hava tit valt opnur úr allar bókini?
- Broytist huglagið í bókini? Hvussu?
- Hóska myndir og tekstur væl saman á opnunum? Hvussu?

# Myndir

Myndirnar í *Eingil í vesturbýnum* eru teknaðar, men allar eru ikki teknaðar eins. Summar eru nærmyndir, summar eru í fjarmyndir og aðrar eru bæði nær- og fjarmyndir. Ofta eru myndir býttar upp, tær kunnu vera býttar í baksýni, miðsýni og forsýni. Baksýnið er aftasti partur í myndini, miðsýnið er miðjan í myndini og forsýnið er fremst í myndini.

Í baksýninum síggja vit tað, sum rørir seg á myndini og vit fáa at vita, hvar vit eru. Í miðsýninum síggja vit tað, sum er umráðandi, og vit helst skulu varnast. Í forsýninum síggja vit tað fremsta í myndini, tað sum er av stórsta týdningi í myndini, tað sum vit skulu varnast.

- Finn eina opnu í *Eingil í vesturbýnum*, sum vísir baksýnið, miðsýnið og forsýnið.

Skriva í heftið.

- Greið frá hvat er at síggja í baksýni.
- Greið frá hvat er at síggja í miðsýni.
- Greið frá hvat er at síggja í forsýni.

- Um eitt av hesum trimum – baksýni, miðsýni, forsýni – ikki var við á myndini, hvussu hevði tað so ávirkað myndina?
- Tak eitt sýni burturúr og greið frá, hvussu hetta ávirkar myndina. Skriva í heftið.
- Leggið fram fyri flokkinum.

- Farið í bólkar saman við teimum, sum hava valt somu opnur sum tit, í mesta lagi 4 í hvørjum. Snakkið saman um, hvat tit, hvør í sínum lagi hava í baksýni, miðsýni og forsýni, hví tit hava gjørt, sum tit hava gjørt, og hvussu hvørt sýni ávirkar myndina og tekstin.

## Persónar

Askur er høvuðspersónur í *Eingil í vesturbýnum*. Hann býr hjá mammu sínari Froyu og vitjar viðhvørt pápa sín Pætur. Foreldrini búgva ikki saman, tí tey eru fráskild.

- Ger eina persónslýsing av Aski. Lýs, hvussu Askur sær út, og hvussu hann er.

  Vit fáa ikki altíð beinleiðis at vita, hvussu Askur er. Her er eitt dømi, sum sigur nakað um Ask, uttan at siga tað beinleiðis. Vit mugu lesa millum reglurnar.

  *- Eri eg so bæði eitt alheimstræ og tað fyrsta mannfólkið á jørðini?*

  *- Ja, sambært gudalæruni, svaraði mamma brosandi.*

  *Nú dámar mær væl at eita Askur, og eg lati sum luft, tá ið onkur argar meg.*

- Ger eina persónslýsing av mammuni.

  Vit fáa ikki altíð beinleiðis at vita, hvussu mamman er. Her er eitt dømi, sum sigur nakað um mammuna, uttan at siga tað beinleiðis. Vit mugu lesa millum reglurnar.

  *- Tá ið eg segði henni frá varúlvinum, hugdi hon bilsin at mær og fór at flenna.*

  *- Sjálvt um neyðardýrið eitur Úlvur og kanska er eitt sindur løgin, hevur hann einki við varúlvar at gera. Hon fekk næstan ikki tosað, so nógv flenti hon. Og so legði hon afturat:*

  *- Tú ert herligur, ert tú!*

- Ger eina persónslýsing av pápanum.

  Vit fáa ikki altíð beinleiðis at vita, hvussu pápin er. Her er eitt dømi, sum sigur nakað um pápan, uttan at siga tað beinleiðis. Vit mugu lesa millum reglurnar.

  *Pápi spurdi, hví eg leikaði so í, og eg segði honum fra dreyminum.*

  *Hann lovaði at svimja undir liðini á mær, og hann segði, at hann ætlaði at keypa mær eina pitsu, hvørja ferð eg svam ein litlan tein saman við honum. Eg kundi sjálvur sleppa at velja, hvat var á pitsuni.*

- Ger eina persónslýsing afturat.
  Tú velur sjálv/sjálvur, hvønn persón úr *Eingil í vesturbýnum* tú vilt skriva um.

# Askur

### Askur og rúmdin

Askur hevur stóran áhuga í rúmdini og tí, sum har er.

- Finn dømi úr bókini, sum vísa áhugan hjá Aski fyri rúmdini.
- Hygg at tekningini og greið frá, hvat á tekningini vísir áhugan hjá Aski fyri rúmdini.

### Askur og ræðsla

Vit fáa fleiri ferðir at vita, at Askur er bangin og ymiskt er, sum hann ikki torir.

- Finn dømi úr bókini, sum vísa, at Askur er bangin og ikki torir eitthvørt.
- Hygg at tekningini og greið frá, hvat á tekningini vísir, at Askur er bangin.

### Askur og gentur

Askur nevnir onkrar gentur í bókini.

- Finn dømi úr bókini, har Askur nevnir gentur.
- Greið frá sambandinum millum Ask og gentuna.

### Askur og foreldrini

Askur býr hjá mammu sínari í vesturbýnum, og pápin býr í Gravarvági. Foreldrini eru skild, men Askur vitjar pápa sín.

- Finn opnur, sum eru um Ask og mammuna.
- Greið frá sambandinum millum Ask og mammuna.
- Finn opnur, sum eru um Ask og pápan.
- Greið frá sambandinum millum Ask og pápan.

### Askur og beiggin

Pápi Ask fær sær nýggja konu, og tey bæði fáa ein son.

- Finn opnurnar, sum eru um, tá ið pápin fær nýggja konu.
- Greið frá, hvussu Aski dámar, at pápin fær sær nýggja konu.
- Finn opnurnar, sum eru um, tá ið Askur fær at vita, at hann skal vera stóribeiggi og til hann verður stóribeiggi.
- Greið frá, hvussu Askur hevur tað við at gerast stóribeiggi.
- Snakkið saman í flokkinum um, hvat tit hava skrivað um Ask. Eru tit samd?

**Snakkið saman í flokkinum**

ASKUR

- Hvat er temað í *Eingil í vesturbýnum*? Eru fleiri tema? Hvat er bókin um?
- Hvussu dámar tær mátan, sum rithøvundur og myndprýðari brúka at siga frá temanum?
- Hvat hugtók teg mest, tekstur ella myndir, ella samanrenningin millum bæði? Greið frá.
- Ímynda tær, at tú skalt siga einum, sum ikki hevur lisið *Eingil í vesturbýnum* frá um bókina. Hvat fortelur tú?
- Skuldi tú skrivað og teknað *Eingil í vesturbýnum*, hevði tú so gjørt okkurt øðrvísi? Greið frá.